VB-KÍ 1-0 (1-0):

# VB á veg úr botninum

**Fyrrapartin av seinna umfarinum royndi KÍ at spæla seg til møguleikar, men vágbingar vóru tættir, og fram ímóti dystarenda vóru teir vandamiklir í snarálopum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Palli Augustinussen og hinir í VB tóku eitt stórt fett burturfrá botninum við sigrinum á KÍ sunnudagin*

*Savnsmynd*

Vágbingar vóru lættir, tá ið teir seinnapartin sunnudagin fóru vestan av Eiðinum. Fyri aðru ferð í ár høvdu teir øll stigini í lummanum. Harvið tóku teir seg longri frá Skála, og tað fer at síggja uppaftur betri út, um teir sunnudagin í Miðvági fara at megna ikki at tapa.

Ímóti KÍ var talan um rættiliga tætta uppgerð, har talan ikki var um nógvar upplagdar málmøguleikar. Á VB liðnum var sentrali miðvøllurin púra útlendskur. Milan Kulic var rættiliga eyðsýndur, tá ið hann megnaði at varðveita bóltin og spæla skilagott frá sær, og aftanfyri hann vóru Slobodan Madzar og spildurnýggi miðvallarin úr Svendborg, Anders Sørensen.

Mortan úr Hørg, sum var ytstur á miðvøllinum í høgru, átti bestu VB royndina í 1. hálvleiki í opnum spæli. Eftir fínt uppspæl gjørdist hann leysur eitt sindur uttanvert brotsteigarmarkið, men skotið fór við síðuna av málinum hjá Kartini Joensen.

KÍ var væl við eina løtu í 1. hálvleiki, men málmøguleikarnir vóru ikki nógvir. Eftir væl spælt álop í høgru og innlegg frá Harley Bertholdsen stútaði Jakob Bymar úr góðari støðu, men bólturin fór við síðuna av málinum hjá Bjarna Johansen.

Einasta málið fekk VB miðskeiðis í 1. hálvleiki, og tað var brotsspark, sum Milan Kulic sendi flatt og dygst úti við stólparótina. Brotssparkið varð dømt ímóti Aleksander Djordjevic fyri at halda Birgiri Jørgensen aftur. Støðan tók seg upp eftir langa sending í KÍ brotsteigin. Teir báðir, Birgir og Aleksander, tókust um bóltin, Birgir fekk tak á, lyfti bóltin upp um KÍ verjuspælaran, sum kendi seg noyddan at nýta óregluligt tiltak fyri at byrgja uppfyri, áðrenn VB spælarin slapp framat.

Onkur vildi hava, at dómarin skuldi fara í reyvalumman eftir reyða litinum, men Suni Johansen valdi gula litin til miðverjan og brotssparksdóm, sum bar sigursmálið til VB við sær.

### Gekk seint fyri seg

Eftir steðgin royndi KÍ at fáa skil og tol í miðvallarspæli, og eina góða løtu vóru teir leikliga omaná. Eisini tí at VB tók sítt fólk langt aftur á vøllin, brynjaði seg eitt sindur frammanfyri egnan brotsteig og dyrgdi eftir møguleikum fyri skjótálopum, sum kortini vóru fáir fyrstu stóru løtuna.

Vágbingar nýttu tær snildir, sum plaga at verða nýttar, tá ið tað ræður um at verja leiðslu. Steðgirnir vóru nógvir, og klaksvíkingar tóktust ørkymlaðir. Næst við at fáa mál var KÍ, tá ið Aleksander Djordjevic frammarlaga í brotsteiginum við høvdinum snittaði hornasparksinnlegg úr vinstru upp undir samankomingina í handara borðinum. Bólturin brast niður á málstrikuna, og so kom KÍ ikki nærri at fáa mál.

Sum seinna umfarið leið, sleptu klaksvíkingar í verjupartinum. Eyðun Klakstein, Jan Andreasen og Leon Bjartalíð vórðu settir á vøllin, men tað segði tað sama. Predrag Zivkovic, sum hesa ferð hevði sett seg sjálvan í miðverjuna, lá einar tvær ferðir, áðrenn Janus Kjærbo loysti hann av, og síðstu tíggju minuttirnar var fleiri ferðir um reppið, at Birgir Jørgensen, sum síðstu løtuna var einsamallur á toppinum, varð spældur leysur.

### Dysturin í tølum

**VB-KÍ 1-0 (1-0)**
**1-0: Milan Kulic (br.)**

**VB:** Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic (Janus Kjærbo, 78.), Eyðun Jacobsen, Dejan Nikolic – Mortan úr Hørg, Slobodan Madzar, Anders Nielsen, Milan Kulic, Palli Augustinussen – Birgir Jørgensen, Dan Djurhuus (Mikael í Lágabø, 83.)

**KÍ:** Kartin Joensen – Harley Bertholdsen, Aleksander Djordjevic, Niclas Niclassen, Símun Joensen – Arnold Joensen (Leon Bjartalíð, 85.), Atli Danielsen, Jan Joensen (Jan Andreasen, 67.), Hjalgrím Elttør (Eyðun Klakstein, 55.) – Ove Nysted, Jakob Bymar
**Gult kort:** Aleksander Djordjevic, Atli Danielsen

**Dómari:** Suni Johansen

GÍ-FS Vágar 2-2 (1-1):

# Timburmenn eftir finaluna

**Gøtumenn vóru ógvuliga illa skerdir undan dystinum móti FS Vágum, og gøtumenn megnaðu ikki at reisa seg eftir tapið í steypafinaluni. Vágamenn duttu eitt pláss niðureftir til næstaftasta pláss**

1. DEILD
*Stefan í Skorini*

GÍ og FS Vágar spældu ein undirhaldandi og spennandi dyst í Sarpigerði sunnudagin. Hvørki av liðunum mundi tó vera nøgt við ein javnleik, tí tað kunnu tey í veruleikanum ikki brúka til so nógv í løtuni.

Liðini skaptu nógvar málmøguleikar gjøgnum dystin, og hóast FS Vágar var á útivølli, sendu vágamenn nógvar leikarar fram á vøllin, tá høvi var til tess.

FS Vágar kom eisini framum seint í fyrra hálvleiki. Eitt eitt gott álop kom Birgir Joensen í góða skotstøðu. Hann royndi seg við einum heldur veikum skoti, sum smeyg sær undir málverjan og í netið til 1-0. Hetta málið má málverjin óivað taka á sín kappa, tí hann skuldi í veruleikanum havt vart fyri skotinum frá Birgiri.

GÍ svaraði tó aftur í næsta minutti, so gleðin hjá vágamonnum var stokkut. Eitt langt innlegg verður sent innfyri úr høgra borði, og við handaru stong standur Bárður á Lakjuni púra leysur og stútar bóltin í kassan. Hetta var eisini støðan við steðgin.

### Kim á blettinum

Tríggjar minuttir eftir steðgin legði Kim Poulsen gestirnar framum eina ferð enn. Clayton Soares tók bóltin niður við bringuni og spældi síðani bólturin sera hegnisliga aftur um seg sjálvan til Kim Poulsen, ið var leysur við málverjanum og kundi leggja FS Vágar framum.

Fyri steðgin skaptu liðini nógvar málmøguleikar, men helst var tað FS Vágar, sum hevði fleiri málmøguleikar. Eftir steðgin gekk heldur striltið hjá GÍ at fáa nakað burturúr, men tað eydnaðist tó at fáa útjavnandi málið.

GÍ hevði fríspark í høgru síðu, sum Janik sendi innfyri. Silva Braga stóð við fremru stong, og bólturin kemur í beinið á honum, og fer upp í hornið. Á leiðini hevur Símun Samuelsen havt ein fót við í spælinum, og hann er noteraður fyri málið á dómaraseðlinum.

Bæði Bartal Eliasen og Henning Jarnskor høvdu leikbann eftir tey reyðu kortini, sum teir fingu í steypafinaluni, og venjarin Krzystof Popczynski sat uttanfyri við skaða.

Bæði liðini liggja nú í tyngra endanum av landskappingini. Næstu ferð skal GÍ spæla grannauppgerð ímóti NSÍ í Runavík, og FS Vágar tekur ímóti VB í Vágunum.

### GÍ-FS Vágar 2-2 (1-1):

0-1: Birgir Joensen, 41.
1-1: Bárður á Lakjuni, 42.
1-2: Kim Poulsen, 48.
2-2: Símun Samuelsen, 76





## Móttøkufólk til Sansir

Vit søkja eftir einum dugnaligum fólki til okkara møttøku. Tú fært ábyrgdina av kunda- og telefonmóttøkuni. Eisini kemur tú at taka tær av øðrum vanligum skrivstovuuppgávum.

Tú ert fyrikomandi, dugir væl at samstarva, ert ágrýtin og dugir at brúka teldu á brúkarastøði. Hevur tú skrivstovuútbúgving ella hóskandi royndir, kann hetta vera ein fyrimunur.

Tú kemur at arbeiða saman við 10 dugnaligum fólkum í einum spennandi og broytiligum arbeiðsumhvørvi, har tú fert at hitta nógv ymisk fólk. Vit halda til í egnum snotiligum hølum mitt í býnum.

Løn og onnur viðurskifti tosa vit nærri um.

Vilt tú gerast okkara móttøkufólk, so send okkum eina umsókn, har tú skrivar nøkur orð um teg. Send umsóknina við posti ella til lena@sansir.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august.

Vilt tú vita meira um starvið, so ring og spyr eftir Lenu.

SANSIR

Sansir · Tinghúsvegur 47 · Postsmoga 1099 · 110 Tórshavn
Tel 355 355 · Faks 355 350 · t-post lena@sansir.fo · www.sansir.fo

Sansir varð stovnað í 1997. Sansir loysa samskiftisuppgávur fyri virki, ið hava ein boðskap at bera fram alment ella innanhýsis. Vit geva virkjum samleika í útsjónd og standa fyri marknaðar- og lýsingarherferðum. Sansir gera sjónvarps- blað- og útvarpslýsingar, faldarar og bløð. Vit veita kunningartænastu við tíðindaskrivum og øðrum orðaðum tilfari. Vit menna heimasíðuskipanir og internetloysnir. Sansir leggja dent á at kenna sínar kundar væl, so samsvar verður millum samskifti og samleika hjá einstaka virkinum.

Ole Ivars



**í Høllini á Hálsi**
Leygardagin 6. sep. kl. 23-04
Atgongumerkir fáast
í Statoilstøðunum kring landið
og í Kunningarstovuni í Havn
**250 kr.**

ATLANTIC AIRWAYS · STATOIL · Hotel Føroyar · SMS · FAXE

## ELDRADAGUR
**- til eldri fólk -**

Eldradagurin í ár verður hildin leygardagin tann 9. august í bygdarhúsinum í Miðvági.

Byrjað verður við morgunmati kl. 9.00 til 10.00.
Døgurði til kl. 12.00 til 13.30. Kaffi kl. 16.00

Fjølbroytt skrá

Kostnaður kr. 250,- fyri hvønn luttakara.
Goldið verður við inngongdina.
Lutaseðlar verða seldir.

Luttøka kann fráboðast á hesum telefonum:
**33 20 53 - 33 31 33 - 33 26 60 - 44 13 96**

Luttøka má fráboðast í seinasta lagi 26. juli har ein eisini kann fáa nærri at vita um skránna.

**Landsfelag Pensjónistanna**

Lesið Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin -tað loysir seg

## Tórshavnar Ítróttarráð

**Úrslit av drátti 4. august 2003**

Hesir seðlar hava vunnið:

| | |
|---|---|
| Vinningur nr. 1: | 16963 |
| Vinningur nr. 2: | 1261 |
| Vinningur nr. 3: | 9499 |
| Vinningur nr. 4: | 18365 |
| Vinningur nr. 5: | 1384 |
| Vinningur nr. 6: | 6736 |
| Vinningur nr. 7: | 2661 |
| Vinningur nr. 8: | 9451 |
| Vinningur nr. 9: | 5405 |

**Vinnarnir vera bidnir um at seta seg í samband við Kristionnu á tlf.: 312380 - 319017 - 227717**